Soleiðis skilir tú



1. Fyrst kannar tú, um fløskan ella dósin er í nóg góðum standi.
   Ansa eftir, at einki brotið glas ella burturkast fer í posan.
   Ivast tú, um pant er á, kanst tú skanna strikukotuna.




Skanna QR-koduna


2. Hvat fer í hvønn posa?
   Pantposi 1: Plast og aluminium.
   Pantposi 2: Glasfløskur.
   Enduráfyllingarfløskur (frá t.d. Føroya Bjór) skulu í kassar.

3. Fyll pantposan upp til strikuna. Posin má tó ikki viga meira enn 15 kg.

4. Lat posan aftur við stripsi.

5. Pantið verður útgoldið.





Posar og strips kunnu bíleggjast frá IRF.
Pant er á posunum. Hetta verður útgoldið, tá ið posin verður latin IRF.

Hesum er pant á ✓



Sodavatn, vatn og øl · Djús · Saft · Likørar/ siropur · Vín · Brennivín · Smoothies * uttan mjólk · Proteindrykkir * uttan mjólk

Hesum er einki pant á ✗



Mjólkarpakkar · Djúspakkar · Smoothies * við mjólk · Proteindrykkir * við mjólk · Meira enn 3 litrar

Sápudunkar · Matoljur · Glaskrukkur · Ymiskt brotið · Vantandi ella ólesilig strikukota

Sumt kann, hóast einki pant er á, framvegis latast inn til endurnýtslu.

PANT
Undir Svartarheyggi
360 Sandavágur
info@pant.fo
www.pant.fo

studio örskap - 09.11.2026